# Føroyameistaraheitið nærkast

**Í dag kann Argjabáturin av røttum leggja sjógv millum seg og hinar bátarnar. Við einum sigri í Vestmanna í dag kunnu teir koma tólv stig fram um nummar tvey, og so skal tað vilja øgiliga illa til, um teir ikki gerast føroyameistarar**



*Manningin á Argjabátinum hevur bæði beinini niðri á lunnunum, hóast føroyameistaraheitið neyvan fer til nakra aðra manning, sum nú sær út*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

UPPTAKT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Kappróður verður í Vestmanna í dag. Hetta er fyrstu ferð, at tað verður róð í Vestmanna á Fjarðastevnu. Men tað er bara stevnuheitið sjálvt sum hevur skift navn. Um tað fer at hava nakað at siga fyri suverena Argjabátin, tað fæst at vita seinni í dag.

Í øllum førum er tað ein sannroynd, at Argjabáturin hevur vunnið tvær tær seinastu ferðirnar FM róður hevur verið í Vestmanna – í 1996 og 2000.

– Tað ætla vit eisini at gera hesuferð, sigur Høgni Jacobsen, bátsformaður. Men hann ger púra greitt, at teir ikki síggja seg sum føroyameistarar enn.

– Tað eru tríggir róðrar eftir, og vit taka teir ein í senn, sigur Høgni.

Men hann viðgongur tó, at tað skal ganga øgiliga illa í hond hjá teimum restina av kappingarárinum, um teir ikki skulu enda ovast.

### Hugaligt

Høgni dylir ikki fyri, at tað er serstakliga hugaligt at rógva í ár. Argjabáturin vann føroyameistaraheitið seinast í 2000. Í 2002 vóru teir sera nær við, men tað gekk ikki. So tað er onki at siga til, at teir eru gull tystir í ár.

Høgni hevur sjálvur drúgvar royndir sum rógvari, og hann sigur, at venjingin hevur verið sera vælskipað í ár.

– Eg havi í øllum førum ongantíð verið so væl fyri sjálvur fyrr, slær hann fast. Tað at teir vinna ferð eftir ferð ger sjálvandi sítt til, at tað er so hugaligt at rógva. Men Høgni leggur dent á, at móttøkan, sum felagið fær, tá tey koma aftur av stevnu, ger tað upp aftur meiri hugaligt.

– Tað er altíð stuttligt at koma aftur, og samanhaldið í felagnum er avbera gott, sigur Høgni Jacobsen, bátsformaður á Argjabátinum.

Seinasta leygardag í Vági fekk Argjabáturin harðari kapping enn væntað. Um tað verður líka hugaligt hjá teimum at koma aftur í kvøld, fæst skjótt at vita.

Í øllum førum er bátsformaðurin ivaleysur, tá hann sigur, at teir ætla at vinna fyri triðju ferð á rað í Vestmanna.

# Minni spenningur í nøkrum róðrum

Í fleiri av róðrunum er meginparturin av spenninginum burtur, hóast tað eru tríggir F M róðrar eftir enn. Ofta hava onkrir meistarar verið funnir á Vestanstevnu, og tað er líkt til, at so verður aftur í ár. Tí hóast fleiri av manningunum kunnu leggja seg sannførandi á odda við einum sigri í dag, so er meistaraheitið kortini ikki 100 % sikkurt í hús.

Hjá 5 mannaførum við dreingjum, 6 manna-førum við kvinnum, 8 mannaførunum er alt nærum leyst og liðugt um tað verða teir somu vinnararnir aftur í dag. Blikur av Argjum, Jarnbardur úr Havn og Argjabáturin kunnu við einum sigri í Vestmanna av sonnum leggja seg á odda í róðrinum. Og har verður tað helst bert ein spurningur um avgreiðslu, um hesir tríggir vinna róðurin á Fjarðastevnu. Men so er tað hitt við, at tað er nakað serligt at vinna Ólavsøkuróðurin. Allar manningar vilja vinna tann róðurin, uttan mun til endaliga úrslitið.

Í hinum trimum róðrunum er nakað av spenningi enn. Jarnbardur og Sundabáturin liggja sum nummar eitt og tvey hjá 6 m annaførum við monnum, Blikur og Sílið hjá gentunum og Havnarbáturin og Nólsoyingurin hjá 10 mannaførunum.

Tó kann ikki sleppast rundan um, at um nú Havnarbáturin vinnur í dag og Sundabáturin eisini, so hava hesir við teirra seks og sjey stigum framman fyri, lagt seg nokk so trygt á odda. Meðan tað hjá gentunum eru einans tvey stig á muni undan róðrinum í dag.

**- sae –**



*Spenningurin er so við og við at vera burtur í fleiri av róðrunum, men hjá millum annað 10 mannaførunum er tó nakað av spenningi eftir. Havnarbáturin liggur á odda við fýra stigum framman fyri Nólsoying á øðrum plássi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ongantíð ov tíðliga at gerast føroyameistari

**Hjá 5 mannaførum við gentum er stórur spenningur í kappingi um at gerast meistari. Blikur og Sílið, sum ávíkavist hava 23 og 21 stig, mugu sigast at vera bestu boðini upp á vinnararnar**

UPPTAKT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Sílið og Blikur kappast harðast um fyrsta plássið hjá 5 mannaførum við gentum. Higartil hava manningarnar vunnið tveir róðrar í part, men betur hevur hilnast í stigum hjá Bliki, og tí eru tær tvey stig framman fyri Sílið undan róðrinum í Vestmanna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Bæði bátsformaðurin á Sílinum og á Bliki eru samdar um, at betur hevði verið, um føroyameistarin varð funnin undan Ólavsøkuni. Báðar kunnu tær hyggja aftur á seinastu Ólavsøkuna, har tað eydnaðist Drekanum at vinna og harvið meistaraheitið eisini. Tá var kappingin eisini sera tøtt í genturóðrinum.

– Tað er ræðuliga spennandi áðrenn róðurin, og øll tosa bara um kappróður, men tað er líka ræðuligt at vera tann, sum tapir gullið á Ólavsøku, sigur Joan Mikkelsen, bátsformaður á Bliki, sum endaði eittans stigi frá meistaraheitinum í fjør.

Hesum er Marina Moraitis, bátsformaður á Sílinum, samd við henni í.

– Tað er ongantíð ov tíðliga at gerast føroyameistari, sigur hon.

Men sum tað sær út nú, so kunnu tær báðar ikki vænta annað, enn at stríðið um meistaraheitið verður avgjørt á sjálvari Ólavsøkuni.

Sílið og Blikur hava vunnið hvør sínar tveir róðrar. Sílið á norðoyastevnu og Jóansøku og Blikur hinar báðar.

Báðar manningarnar eru sum skilst væl fyri og sera uppsettar, so tað er lagt upp til ein spennandi róður hjá gentunum í dag.

Men her skal so sanniliga eisini havast í huga, at tað er tætt millum bátarnar, so væl kann hugsast, at onkur av hinum bátunum, sum hava snoddað til oddin, fara at blanda seg uppí stríðið.

# Vikuskifti

Nr. 125 • leygardagur • 3. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Við vinnuligari menning sum dømi



Tinghellan á s. 8–9




# Býurin verður vaskaður

CHRISTIANIA
*Firouz Gaini*

Ein gøta í Keypmannahavn hevur seinastu tíðina verið fyri harðrendum álopum av monnum við gassum, skjøldrum og enntá pistólum. Í snarálopum hava teir, mannsterkir og vápnaðir til tenninar, ruddað gøtuna og handtikið fólk í hópatali. Gøtan hevur annars í ein mansaldur drigið ferðafólk at sær; sjálvt skipaðar bussferðir hava verið til hendan heimskenda býarpartin í Keypmannahavn. Talan er í veruleikanum um ein bý í býnum, ella eitt land í landinum, tí her liva fólk, ið ikki fylgja vanligu siðunum og reglunum í Danmark annars. Íbúgvarnir í býarpartinum hava í meira enn tjúgu ár fingið frið at liva sum tey sjálvi ynskja, uttan uppílegging frá myndugleikunum. Býarparturin er ein fríðstaður fyri alternativar lívsstílar. Vegurin er Pusher Street og býarparturin er Christiania.

Ein reyður dúkur við trimum gulum prikkum; soleiðis sær flaggið hjá christianittunum út. Prikkarnir eru i-ini í navninum Christiania. Eitt stuttligt merki, ið er avmyndað á blusum, ið síggjast kring alt Keypmannahavn, tí Christiania hevur nógv fleiri stuðlar enn íbúgvar. Býarparturin - ella fríðstaðurin - liggur á einum fyrrverandi hernaðarøki hjá tí danska flotanum á Christianshavn, og tann almenna adressan er Bådsmandsstrædet. Býarparturin hevur fleiri kend konserthús, eisini góðar matstovur, men er tó mest kendur fyri Pusher Street, ið heilt fram til tað stóra politi-átakið fyrr í vár var ein stórur opin hassjmarknaður, har ið onki varð gjørt fyri at loyna handilsvørurnar. Á smáum borðum á gøtuni lógu vørurnar, næstan sum á loppumarknaði, og prísir og navn stóðu á pappírslepum á borð-inum. Keyparar úr øllum Danmark, men eisini úr øðrum Norðurlondum, settu kósina inn í fríðstaðin fyri at handla. Nógv kilo av tí brúna rúsevninum skiftu eigara hvønn dag, og bakmenninir hava ivaleyst tjent seg ríkar av hesum brúna gulli. Hervilig brotsmannalið, serliga Hells Angels, sigast at hava stýrt hassjhandlinum við harðari hond, hóast rokkararnir sjálvandi ikki sjálvir stóðu við diskin. Christianittarnir hava tískil ikki fingið tað stóra burturúr reint fíggjarliga, men ein partur av íbúgvunum hava helst verið rættiliga góðir kundar í Pusher Street.

At gøtan við tí opna hassjhandlinum nú er ruddað, eru tey flestu ivaleyst fegin um, men tann rái og harði framferðarháttin, sum politistarnir vístu í Christiania í vár, kann einans vekja andstygd ímillum borgararnar í býnum. Ovastin fyri løgregludeildina, sum skuldi taka sær av hesi uppgávu, var fleiri ferðir í tí danska sjónvarpinum frammanundan og fortaldi um fyrireikingarnar til átakið; um byrjanina til endan á Christiania: hann skuldi rudda upp, reinsa, vaska, snøgga býin... Talan var sostatt um at gera býin reinari. Og Pusher Street er einans byrjanin, tí alt Christiania er í vanda fyri at blíva "ruddað upp" í "høvuðsreingerðini" í Danmark hesi árini. Christiania skal geva pláss fyri modernaðum nýggjum familjuíbúðum til penar íbúgvar við fastari mánaðarløn, hundi og summarhúsi. Samstundis sum Christiania skal temjast og undir strangt eftirlit, so verða danskir hermenn sendir til Irak at "hjálpa" irakum at byggja upp ein demokratiskan tjóðstat. Og samtundis verða øll portur inn til landið eisini stongd fyri fremmandum innflytarum. Høvuðsreingerðin í Danmark sæst á øllum økjum. Við Ariel gólvsápu og kusti verður skrubbað og sópað. Átakið ímóti Christiania er ein stórur súmbolskur sigur fyri teir politisku myndugleikarnar, tí býarparturin umboðar tað alternativa Danmark, sum núverandi stjórn helst vil sópa burtur av danskari jørð.

Vónandi kann Christiania, nú Pusher Street tíbetur er burturi, fáa eitt betri image á Christianborg og í fjølmiðlunum, tí býarparturin er meira enn rúsevnisbrúk og -søla. Christiania er ein leivd úr hippitíðini, ið hevur verið fyri vaksandi trýsti frá umheiminum seinastu árini. Ein heimskendur býarpartur í Keypmannahavn úr tí tíðini tá Danmark hevði orð fyri at vera eitt tolerant og rúmsátt samfelag. Ein býarpartur, ið legði líka í búskaparligari menning og marknaðarføring. Ein roynd at skapa eitt frælst samfelag, sum Kropotkin, Bakunin (um teir vóru á lívi), og aðrir stórir anarkistar, høvdu verið ovfarnir av. Býurin verður fátækari, innantómari, gráari, strævnari, um frí rúm sum Christiania hvørva. Høvuðsreingerðin vaskar ov nógv fólk burtur úr eygsjón. Endamál hennara er, fyrst og fremst, at rudda ókrút burtur í annað stað; at sleppa frá at síggja "hini"; at verja og avbyrgja seg frá teimum, sum eru øðrvísi; at flyta trupulleikar, ikki at loysa teir.